FØROYATELE

# 17

FØROYATELE

# 5 ára yvirlit – konsern

| | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | | | |
| Inntøkur íalt | 463,5 | 475,4 | 481,8 | 483,5 | 482,5 |
| Bruttoúrslit | 260,0 | 257,7 | 264,9 | 284,7 | 274,0 |
| Úrslit áðrenn avskrivingar (EBITDA) | 134,5 | 128,4 | 138,2 | 162,3 | 146,5 |
| Úrslit áðrenn rentur (EBIT) | 68,0 | 60,7 | 40,0 | 82,8 | 76,5 |
| Ársins úrslit | 50,9 | 44,0 | 29,8 | 58,3 | 55,7 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Støðisogn | 540,1 | 576,9 | 553,9 | 552,6 | 564,0 |
| Íløgur í materiella støðisogn | 29,8 | 67,6 | 100,6 | 54,9 | 31,5 |
| Íløgur í immateriella støðisogn | 5,4 | 8,6 | -1,5 | 9,6 | 12,5 |
| Ogn í umferð | 213,5 | 203,5 | 221,8 | 261,4 | 243,2 |
| Ogn íalt | 753,5 | 780,3 | 775,6 | 814,0 | 807,3 |
| Eginpeningur | 489,3 | 458,6 | 436,3 | 431,5 | 405,2 |
| **Peningastreymur** | | | | | |
| Frá rakstri | 119,2 | 112,9 | 82,9 | 146,1 | 138,5 |
| Frá íløgum | -29,3 | -90,7 | -99,1 | -67,3 | -41,7 |
| Frá fígging | -73,9 | -38,0 | -41,7 | -49,1 | -93,4 |
| Broyting í tøkum peningi | 16,1 | -15,8 | -61,4 | 29,7 | 3,5 |
| Fríur peningastreymur | 89,9 | 22,2 | -19,6 | 78,8 | 96,8 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| EBITDA í mun til sølu lutfall | 29,0 | 27,0 | 28,7 | 33,6 | 30,4 |
| Rakstraravkast | 14,7 | 12,8 | 8,3 | 17,1 | 15,8 |
| Ognaravkast | 9,0 | 7,8 | 5,2 | 10,2 | 9,5 |
| Gjaldførisevni | 153,4 | 148,3 | 160,2 | 168,5 | 159,5 |
| Trygdarevni | 64,9 | 58,8 | 56,2 | 53,0 | 50,2 |
| **Aðrar upplýsingar** | | | | | |
| Starvsfólk (ársverk) | 249 | 246 | 252 | 249 | 250 |
| Inntøkur fyri hvørt starvsfólki (mió. DKK) | 1,861 | 1,932 | 1,912 | 1,942 | 1,930 |
| Úrslit fyri hvørt starvsfólki (mió. DKK) | 0,205 | 0,179 | 0,118 | 0,234 | 0,223 |

Allar upphæddir eru í mió. kr.

| | | |
|---|---|---|
| Rakstraravkast | = | (úrslit áðrenn rentur x 100)/inntøkur |
| Ognaravkast | = | (úrslit áðrenn rentur x 100)/ogn íalt |
| Gjaldførisevni | = | (ogn í umferð x 100)/stuttfreistað skuld |
| Trygdarevni | = | (eginpeningur, íroknað minnilutaeigarar x 100)/ogn íalt |

# P/F Telefonverkið

Skrás.nr. P/F 2697

## Ársfrásøgn fyri 2017

Ársfrásøgnin er framløgd og góðkend av ársaðalfundi

felagsins hin 19. apríl 2018

-----------------------------------------------

Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit

LEIÐSLUFRÁGREIÐING 2017 ..... 1
FT SAMSKIFTI ..... 3
FT NET ..... 4
SHEFA ..... 5
TELEVARPIÐ ..... 5
VÁÐASTÝRING ..... 7
UMHVØRVISÁBYRGD ..... 8
SAMFELAGSÁBYRGD ..... 8
ÁTEKNING LEIÐSLURNAR ..... 10
VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA ..... 11
RAKSTRARROKNSKAPUR ..... 13
FÍGGJARSTØÐA ..... 14
NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR ..... 23
NEVND & STJÓRN ..... 28

## Upplýsingar um felagið

Skrásetingarnavn: P/f Telefonverkið · Skrásetingarnr.: 2697

Hjánavn: Føroya Tele · Bústaður: Klingran 1-5, 188 Hoyvík

Heimstaðarkommuna: 100 Tórshavn · Tel: +298 303030 · Fax: +298 303031

Heimasíða: www.ft.fo · Teldupostur: ft@ft.fo

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING 2017

2017 gjørdist eitt gott og virkið ár fyri Føroya Tele. Nú 2017 er farið afturum kann sannast, at gingist hevur betur enn spátt varð við ársbyrjan. Fyri Føroya Tele hevur 2017 eisini verið eitt broytingarár, har nýggj virkisøkir eru løgd til og onnur farin frá.

## ÁHALDANDI BROYTINGAR MERKJAST

Úrslitið eftir skatt gjørdist 50,9 milliónir krónur í mun til 44 milliónir krónur árið fyri.

Hóast samtakið hevur lækkað smá- og heilsøluprísin á fartelefonhaldum, breiðbandstænastum, fipursambondum og uttanlandssambondum, so eydnaðist tað Føroya Tele at náa eitt rakstrarúrslit, sum gjørdist betur enn árið fyri. At Føroya Tele í 2017 kann vísa eitt slíkt avlop, er úrslit av, at starvsfólkini áhaldandi bróta upp úr nýggjum fyri at menna ein enn skynsamari og smidligari rakstur.

## MARKNAÐUR Í VIRKNARI KAPPING

Kappingin á føroyska fjarskiftismarknaðinum er framvegis hørð. Við góðum produktum og tænastum, stendur Føroya Tele seg væl í kappingini. Menningin, sum er farin fram á millum annað fartelefontænastunum hjá Føroya Tele ger, at hesar í dag av sonnum kunnu samanberast við tænasturnar, ið verða veittar í størru londunum kring okkum – bæði tá umræður prís og góðsku.

Við útbyggingunum hjá FT Net av VDSL2 tøkni kring landið, eru karmarnir hjá fjarskiftisveitarunum at kappast á breiðbandsøkinum góðir. Í 2017 setti Føroya Tele veruliga hol á kappingina á breiðbandstænastunum, tá prísirnir blivu lækkaðir, ferðin hækkað og breiðbandskundarnir fingu møguleika at avgreiða síni hald á netinum.

Við átøkum og menning av nýggjum og betri produktum hevur farna árið eydnast væl hjá Føroya Tele, ið framhaldandi vinnur nýggjar kundar á marknaðinum. Hetta er tekin um, at Føroya Tele er á rættari kós.

## VIRKSEMI UTTANLANDS

Høvuðsmarknaðurin hjá Føroya Tele er føroyski marknaðurin. Tá møguleikar, ið eru knýttir at kjarnuvirkseminum hjá Føroya Tele, stinga seg upp uttanlands, eiga hesir tó eisini at verða royndir. Við at troyta slíkar møguleikar, hevur tað eydnast dótturfeløgunum SHEFA og Televarpinum, at styrkja um sítt virkisgrundarlag við at selja sínar kjarnutænastur uttan fyri landoddarnar.

Gjøgnum dótturfelagið SHEFA veitir Føroya Tele høvuðssambandið til bæði Orknoyggjar og Hetland. Harumframt veitir SHEFA eisini breiðbandssamband til oljuvinnuna vestan fyri Hetland og í danska partinum av Norðsjónum.

Virksemið, sum SHEFA hevur ment uttanlands, stendur í dag fyri umleið 10 prosentum av samlaðu søluni í samtakinum og fyri umleið 75 prosentum av inntøkunum hjá SHEFA. Virksemið uttanlands kemur eisini ítøkiliga føroysku brúkaranum til frama við, at fleiri eru um at bera stóru íløgurnar, sum eru gjørdar í sjókaðlar.

Eisini Televarpið er virkið uttanlands. Í 2017 víðkaði Televarpið um sítt virksemi, til at fevna um veitingar til danska og grønlendska marknaðin. Tøkniligi pallurin hjá Televarpinum gjørdist við hesum báðum avtalum atkomuligir fyri meira enn tvífalt so nógvum brúkarum, og hetta styrkir sostatt grundarlagið handan pallin. Avtalurnar koma við tíðini at føra við sær eitt víðkað úrvalið av rásum og tænastum hjá Televarpinum, ið eisini kemur føroysku kundunum til frama.

Hesar avtalurnar bera boð um, at føroysku loysnirnar eru kappingarførar uttanlands.

## UNDIRSTØÐUKERVIÐ Í HEIMSFLOKKI

Sett er út í kortið, at Føroya Tele bæði nú og í framtíðini skal tryggja føroyska samfelagnum eitt undirstøðukervi í heimsklassa. Settu málini eru høg, og krevja, at tað miðvíst og áhaldandi verða gjørdar íløgur í bæði luft- og jarðbundna fjarskiftiskervið umframt at neyðugt er, at tryggja uttanlandssambond, sum megna, at bera stóra vøksturin í datanýtlsu.

Farnetið hjá Føroya Tele er í heimsklassa og torført er at finna onnur lond, ið kunnu samanbera seg við farnetið hjá Føroya Tele. Tað merkir ikki, at Føroya Tele er komið á mál, men heldur, at Føroyar nú er við í fremstu rók tøkniliga. 4G LTE farnetið hjá Føroya Tele er landsfevnandi og dekkar so at siga 100% av bygdum øki í Føroyum umframt langt til havs og til fjals.

Í jarðbundna fjarskiftisnetið skulu enn stórar íløgur gerast fyri at náa sama støði sum á farnetinum. Sum ein liður í at røkka málinum um eitt jarðbundið internet í heimsklassa, er Føroya Tele farið undir stóru verkætlanina at breiða út fipur kring landið. Við hesi verkætlanini verða Føroyar framtíðartryggjaðar og kunnu njóta eitt tað besta og skjótasta internetið í heiminum.

At varðveita høga støðið á farnetinum og at lyfta breiðbandstænasturnar upp á sama støðið og harvið tryggja Føroyum fjarskifti í heimsklassa, krevur eitt sterkt samtak við røttu tøkniligu førleikunum og einari fíggjarliga orku, sum kann bera neyðugu íløgurnar.

## TALGILDUR SAMLEIKI

Á sumri í 2017 vann Føroya Tele, saman við kt-fyritøkuni Klintra, útboðið um at menna nýggja føroyska talgilda samleikan. Nýggi talgildi samleikin er ætlaður til eyðmerking, innritan og undirskrift hjá øllum borgarum á talgildum tænastum. Talgildi samleikin gerst soleiðis kervið undir alt størri parti av talgildum samskifti millum borgarar, fyritøkur og stovnar. Fyri Føroya Tele er hetta eitt øki, sum liggur uppat kjarnuvirkseminum og verður væntandi við til, at skapa grundarlag fyri nýggjum tænastum og produktum til kundarnar.

## MIÐSAVNAN AV VIRKSEMI

Føroya Tele ætlar í størri mun at miðsavna sína orku um kjarnuvirksemið felagsins, nevniliga at hava í hondum og reka fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastu umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi. Sum liður í hesum, valdi Føroya Tele í 2017 at selja sín ognarlut í Vikmar P/F. Hóast søluna, so heldur samstarvið millum Vikmar og feløgini í Føroya Tele samtakinum fram eins og áður.

Somuleiðis varð í 2017 støða tikin til at seta 43,9% av partapeninginum í Formula alment til sølu. Við ætlaðu søluni lækkar ongarluturin hjá Føroya Tele úr 77,9% niður í 34%. Eftir ætlan, verður sølan framd í fyrsta ársfjórðingi av 2018.

# FT SAMSKIFTI

Kundatænasturnar hjá Føroya Tele eru savnaðar í dótturfelagnum FT Samskifti, so tað er gjøgnumskygt, hvar inntøkur og útreiðslur verða hildnar í samtakinum. Hetta ger tað samstundis sjónligt, at FT Samskifti keypir tænastur frá feløgunum í samtakinum við somu treytum, sum aðrir tænastuveitarar.

Undir FT Samskifti hoyra bæði privat- og vinnukundaøkið, umframt at FT Samskifti eigur og rekur egið 4G LTE farnet.

## MARKNAÐARSTØÐAN

Í 2017 stóð Føroya Tele seg aftur væl í kappingini á føroyska marknaðinum. Áhaldandi íløgur í landsumfatandi 4G LTE farnetið, sum er at meta millum tey bestu í heiminum, hava økt um kunda-nøgdsemið og kundaskaran. Somuleiðis hevur uppraðfestingin av kundatænastu, support og sjálvgreiðslum stuðlað undir góða kundanøgdseminum.

Í 2017 vaks talið av fartelefonhaldum úr 41.188 við árslok 2016 til 42.192 við árslok 2017. Orsakað av haldbygnaðarbroyt-ingum og prislækkingum á heysti í 2016, so stendur økingin í fartelefonhaldum tó ikki mát við lækkingina í inntøkunum.

Talið av fastnethaldum hjá Føroya Tele hevur verið minkandi, og soleiðis varð eisini í 2017. Við ársenda 2016 hevði Føroya Tele 12.770 fastnethald, og við árslok 2017 fall hetta til 11.442 fastnethald.

Breiðbandsmarknaðurin hevur verið sera støðugur seinastu árini, men í november 2017 valdi Føroya Tele at gera breiðbandshald á Ver til privata húsarhaldið.

Við hesi broytingini lækkaði Føroya Tele eisini prísin munandi. Hóast lægri prísir hevur tað eydnast at økt um inntøkurnar frá breiðbandstænastum við 4,5 prosentum. Hetta kemst í stóran mun av, at kundar uppstiga til breiðbandshald við hægri ferð.

## GERAST EFFEKTIVARI

Við gongdini seinnu árini og einum málsetningi um at bjóða enn betri og bíligari tænastur, so er tað eyðsæð neyðugt at tryggja, at inntøkur og kostnaðir fylgjast at. Hetta eru somuleiðis ein fortreyt fyri, at tilfeingi er til at gera neyðugu íløgurnar í nýggja tøkni og nýggjar tænastur, sum kundunum tørva.

Tí verður tað framhaldandi arbeitt miðvíst við at gera skipanir og mannagongdir einfaldar og skynsamar, eins og tað verður arbeitt við at gera enn betri avtalur við høvuðsveitarar felagsins.

Í 2017 varð nógv gjørt fyri at dagføra innanhýsis KT-skipanir, soleiðis at hesar stuðla undir einfaldari og skynsamari arbeiðsgongdum.

Umleggingar av avtalum við høvuðs-veitarar lætti aftur munandi um rakstrarkostnaðin í 2017.

## KAPPINGIN GONGUR EFTIR VILD

Síðan tað gjørdist møguligt at flyta fartelefonnummur millum føroysku veitararnar, hevur Føroya Tele sæð eina áhaldandi tilgongd av nýggjum kundum. Hendan gongdin helt fram í 2017, har marknaðarparturin hjá Føroya Tele vaks við einum sløkum prosenti. Við tilgongdini av nýggjum kundum kann staðfestast, at Føroya Tele stendur seg væl í kappingini.

FARTELEFONHALD: Í 2017 økti Føroya Tele í fleiri umførum um talið av londum, har kundarnir kundu reika sum heima við sínum fartelefonhaldi. Nýggju londini, ið vórðu íroknað í 2017, eru USA, Kanada, Andorra, Makedónia, Montenegro, Serbia, Slovenia, Turkaland, Russland og Ukraina. Nú kunnu kundarnir reika sum heima í 71 londum og oyggjum.

Úrvalið av fartelefonhaldum varð eisini víðkað í 2017. Serliga tørvurin eftir data er øktur munandi seinastu árini. Í Ver kom 26GB afturat, meðan Vinnan fekk 52GB afturat sínum úrvali.

TÓLNET KOM TIL FØROYAR: Tíðliga á vári 2017 kom Føroya Tele á marknaðin við eini nýggjari skipan, ið kallast Tólnet. Hetta er føroyska orðið fyri altjóða heitið IoT – Internet of Things. Fyrsta tólið, sum kom á marknaðin, var ein skipan til bilin.

Tólnet til bilin gevur brúkaranum eina røð av upplýsingum um bilin á eini app, sum er gjørd til endamálið. Harumframt verður skipanin nýtt til eina flotastýring, ið Føroya Tele veitir fyritøkum.

HIN SEINASTA TELEFONBÓKIN: Í 2017 vóru 110 ár liðin, síðani fyrsta telefonbókin kom út. Telefonbókin hevur nú tænt fyri seg, og tískil varð 2017 merkt av, at telefonbókin varð útgivin fyri seinastu ferð.

Sona, sum er nýggi talgildi kunningarpallur hjá Føroya Tele, kemur at yvirtaka leiklutin hjá telefonbókini og nummar.fo. Sona kemur at veita kendu nummarupplýsingarnar, men kemur samstundis at savna kunning um tiltøk, tilboð og mangt annað á einum staði. Nýggja tænastan verður tøk á vári 2018.

DAGFØRING AV TELEBÚÐUNUM: Í 2017 vórðu Telebúðirnar í Klaksvík og partvíst á Tvøroyri dagførdar og fríðkaðar. Hetta merkir, at allar Telebúðirnar nú eru dagførdar og nútímansgjørdar.

ARCTIC MOBILE: Í mai 2017 kom Føroya Tele á marknaðin við Arctic Mobile, sum er ein tænasta til sjóvinnuna. Arctic Mobile er eitt samstarv millum Føroya Tele, Vikmar, íslendska Síminn og grønlendska Tele-Post. Tænastan ger tað møguligt hjá sjófólki umborð á langfaraskipum at tosa og smsa við fartelefonini á sama hátt, sum tá tey reika við fartelefonini í øðrum londum.

FARNETIÐ GERST ENN BETRI: Farnetið hjá Føroya Tele er í heimsklassa, og torført er at finna onnur lond, ið kunnu samanbera seg við farnetið hjá Føroya Tele.

Sum liður í at varðveita støðuna, vórðu í 2017 millum annað gjørdar íløgur í at uppstiga farnetið til 4,5G á útvaldum økjum, har datanýtslan er hægst. Eisini varð arbeitt við at gera dekningin enn betur í bygdum og býum kring alt landið.

## FT NET

Sum heilsøluveitari av fjarskiftistænastum, er aðalmálið hjá FT Net at bjóða veitarum á føroyska marknaðinum javnbjóðis atgongd til eitt trygt net, sum kann vera grundarlagið undir munagóðum fjarskiftistænastum til føroyska marknaðin.

FT Net átekur sær at tryggja, at føroyska fjarskiftisnetið støðugt verður dagført, útbygt og framtíðartryggjað til frama fyri føroyska samfelagið.

GONGDIN Í 2017

Útbyggingin av VDSL2 breiðbandstøkni helt áfram í 2017, og málið fyri árið var, at 90% av øllum húsarhaldum í Føroyum við árslok skuldu hava møguleika fyri at útvega sær breiðbandsferðir upp á 50Mbit ella hægri. Hægru breiðbandsferðirnar kunnu veitast við, at gøtuskáp eru sett upp kring landið við VDSL2 breiðbandsútgerð, umframt at hendan útgerð eisini er sett upp í verandi tøknihúsum hjá FT Net.

Til seinasta partin av hesi verkætlan, sum er í gongd, var neyðugt at gera ávísar umleggingar av fastnet telefontænastuni. Saman við breiðbands- og telefonveitarunum á føroyska marknaðinum varð gjøgnum árið arbeitt fyri at fáa hettar í lag.

Í sambandi við VDSL2 verkætlanina, hevur umfatandi grevstur verið av fipurkaðlum fram til nýggju gøtuskápini. Nakað av

hesum grevstri hevur verið samskipað við, at fipurkaðlar samstundis eru lagdir til mobilbasisstøðir, sum ikki høvdu fipursamband frammanundan.

Sum framhald av VDSL2 verkætlanini verður í 2018 byrjað uppá at leggja fipurkaðlar heilt út til brúkaran. Nýggju fipurtænastumar verða tøkar hjá føroysku fjarskiftisveitarunum, at veita sínum kundum í seinnu hálvu av 2018. Talan er um eina landsumfatandi verkætlan, sum fer at krevja nógva arbeiðs- og fíggjarliga orku hjá FT Net.

Fyrireikingar blivu gjørdar í 2017, har samráðst hevur verið við veitarar av tekniskari útgerð, fipurkaðlum, rørum, brunnum og øðrum um møguligar loysnir.

Eisini varð royndarverkætlan gjørd, har fipurnet varð lagt inn í nakrar av bústaðunum við Myllutjørn í Hoyvík, har íbúgvarnir hava havt møguleika fyri at fáa internet samband yvir fipurnet við sera høgari ferð.

Størri fipurstrekkir, sum eru gjørd í 2017, eru samband millum Bø og Gásadal, og millum Funningsfjørð og Hellurnar og samband til Norðadals.

## SHEFA

Tað mesta av føroyska fjarskiftis-sambandinum til umheimin gongur gjøgnum SHEFA-2 kaðalin, ið er annar av kaðlunum, sum SHEFA eigur. Hin kaðalin er Cantat-3, ið veitir eyka trygd fyri samskifti føroyinga við útheimin. Harafturat fáa føroysku fjarskiftisveitarnir eisini uttanlandssamband gjøgnum íslendska kaðalin, Farice.

Umframt at veita fjarskiftissamband til Føroyar, veitir SHEFA eisini tænastur uttanlands. SHEFA-2 kaðalin er høvuðssambandið hjá fjarskiftisveitarum, ið virka í Orknoyggjum og Hetlandi. Harumframt, veitir SHEFA fjarskiftis-samband til eina røð av oljufeløgum, sum virka vestanfyri Hetland og gjøgnum Cantat kaðalin verður samband veitt til oljupallar hjá Maersk og Hess í danska partinum av Norðsjónum.

Shefa fór í 2017 undir samstarv við Norska felagið Tampnet, sum veitir mobil-tænastur til frálandavinnuna í Norðsjónum og í Meksikanska Golfinum.

Saman við Tampnet gjørdi SHEFA í 2017 avtalu við BP um at seta útgerð upp á Glen Lyon framleiðsluskipinum hjá BP á Schiehallion økinum vestan fyri Hetland. Útgerðin til at veita mobiltænastur verður væntandi sett upp í fyrra hálvári av 2018.

Ætlanin er at bjóða somu tænastu fram á øðrum framleiðslueindum bæði í økinum vestan fyri Hetland, og í danska partinum av Norðsjónum.

## TELEVARPIÐ

5. desember 2017 vóru tað 15 ár síðani, at Televarpið varð sett á stovn. Televarpið er størsti sjónvarpsveitari í Føroyum og røkkur 100% av húsarhaldunum við DVB-TV og IP tøkni.

Televarpið bjóðar eitt breitt úrval av rásum og tænastum, ið verða settar saman í ymsar pakkar til føroyska brúkaran. Hesi árini er ein stórur partur av føroyingum vorðnir kundagrundarlagið hjá Televarpinum.

Við ársenda 2017 var haldaratalið 9.504 í mun til 9.543 við ársenda 2016.

Televarpið hevur frá byrjan verið í kapping við siðbundnu rásveitararnar. Seinnu árini er kappingin nógv herd, eftir at altjóða veitarar nú veita alskyns sjónvarpstilfar umvegis internetið.

Krøvini til Televarpið gerast tí alsamt hægri. Televarpið hevur seinastu árini brúkt nógva orku, at menna verandi og nýggjar tænastur fyri at kunna veita nútímans sjónvarpstænastur.

2017 var árið, har Televarpið byrjaði at veita sjónvarpstænastur uttan fyri landoddarnar. Í juni 2017 gjørdist Televarpið tænastuveitari hjá donsku fyritøkuni Kabelplus, har partarnir í felag veita sjónvarps-, internet- og telefontænastur til áleið 9.500 húsarhald í Ishøj Kommune. Og í november 2017 fór grønlendska Nanoq Media undir at veita eina netvarpsloysn til sínar kundar við Televarpinum sum veitara.

# VÁÐASTÝRING

## ALMENNUR VÁÐI

Føroya Tele er tætt knýtt at føroyska búskapinum, tí størsti parturin av inntøkunum og virkisøkjunum eru í Føroyum. Hetta ger samtakið eitt sindur viðbrekið fyri sveiggjum í føroyska búskapinum. Hvussu verður og ikki, so skal Føroya Tele megna at laga seg til umstøðurnar og arbeiðir tískil støðugt við at minka um allar váðar.

## TØKNILIGUR VÁÐI

Føroya Tele er tætt knýtt at fjølmentari tøkni. Nakrar tøkniligar íløgur kunnu vísa seg møguliga ikki, at hava ta livitíð ella kasta ikki tað av sær, ið væntað var. Hetta kann millum annað vera orsakað av skjótari tøkniligari menning, ið ger íløgur ótíðarhóskandi, ella broyttum eftirspurningi frá kundum. Framstig hava negativar avleiðingar, um Føroya Tele ikki heldur seg frammarlaga tøkniliga; serliga samanborið við tey, sum samtakið kappast beinleiðis við.

## INFRASTRUKTURVÁÐI

Føroyar liggja so fjarskotnar í mun til umheimin, at vit hava tørv á tryggum uttanlandssamskifti til evropeiska meginlandið. Hetta hevur við sær, at Føroyar og Føroya Tele hava ein váða í at missa uttanlandssambandið við telefon og data.

Føroya Tele eigur tveir undirsjóvarkaðlar út í heim. Shefa-2, sum varð bygdur í 2008, og Cantat-3, sum bleiv yvirtikin í 2012. Harumframt verður eyka kapasitetur og redundansur keyptur á Farice kaðalinum millum Føroyar, Ísland og Skotland. Sostatt eru trý kaðalsambond tøk, sum minka munandi um váðan at missa tele- og datasambandið við restina av heiminum.

## FÍGGJARVÁÐI

Samtakið kann gjøgnum rakstur, íløgur og fígging verða ávirkað av broytingum í gjaldoyravirði og rentustøði. Føroya Tele hevur tiltøk til at stýra fíggjarligu váðunum, sum samtakið frammanundan hevur tikið á seg, á besta hátt.

## GJALDSOYRAVÁÐI

Føroya Tele samtakið hevur sítt størsta virksemi í Føroyum, og meginparturin av avrokningunum eru í donskum krónum. Av øðrum gjaldoyrum fara gjaldingar fram í evrum, US dollarum og bretskum pundum. Eftir at hava mett um hesar peninga upphæddir og teir váðar, ið knýta seg at hesum, er Føroya Tele komið til ta niðurstøðu, at váðin er so mikið avmarkaður, at tað er fíggjarliga gagnleyst at seta í verk skipaða gjaldoyraváðavernd. Føroya Tele umhugsar kortini serliga váðavernd í samband við einstakar transaktiónir í útlendskum gjaldoyra.

## RENTUVÁÐI

Samtakið hevur skuld, og broytingar í rentustøðinum kunnu hava eina ávísa ávirkan. Eftir at hava mett um hendan rentuváða, er Føroya Tele komið til ta niðurstøðu, at váðin er nøktandi avmarkaður.

## KREDITTVÁÐI

Samtakið hevur ikki stórvegis váða av einstøkum kundum ella samhandilsfeløgum. Samtakið ansar støðugt eftir skuldarbindingini hjá kundum mótvegis felagnum og somuleiðis við samstarvsfeløgum.

Føroya Tele setir sítt gjaldføri í vælriknar fíggjarstovnar við góðum umdømi í Føroyum og Danmark.

## UMHVØRVISÁBYRGD

Vit hava øll eina ábyrgd fyri umhvørvinum. Hjá Føroya Tele er málið at gagnnýta alt tilfar sum best, at nýta orku skynsamliga, at fara væl um økið kring Føroya Tele og sýna ein fyrimyndarligan atburð í samfelagnum.

Føroya Tele miðar alsamt eftir, at tiltøk verða sett í verk, sum minka um el-nýtsluna og verja umhvørvið eins og skapa ein skynsamari rakstur fyri felagið. Tá íløgur verða gjørdar í nýggja útgerð, bygningar og líknandi, er orkunýtslan av sera stórum týdningi. Í eini stórari fyritøku, sum Føroya Tele, verður nógv pappír nýtt. Í tí dagliga verður miðjað eftir at skriva so lítið út sum gjørligt. Alt papp og pappír, sum verður beint burtur, fer til endurvinningar. Alt lívrunnið tilfar frá matstovuni á Føroya Tele verður komposterað á staðnum. Tað sama er galdandi fyri sligið gras og vøkstur annars uttanfyri. Sum heild verður nógv gjørt burturúr, at burturkastið verður beint burtur so umhvørvisvinarligt sum gjørligt.

## SAMFELAGSÁBYRGD

Í tráð við ársroknskaparlógina, hevur Føroya Tele orða ein politikk fyri, hvussu Føroya Tele í sínum virki skal vísa samfelagsábyrgd. Upplýsingar um samfelagspolitikk felagsins eru at finna á heimasíðuni www.ft.fo/csr.

# BÚSKAPARÁRIÐ

Føroya Tele kann í 2017 vísa á eitt gott fíggjarligt úrslit.

RAKSTUR
Inntøkurnar hjá Føroya Tele gjørdust lakari enn í 2016. Nettosølan fall úr 475 mió. kr. í 2016 til 463 mió. kr. í 2017. Fallið í inntøkunum stavar frá príslækkingum á tænastunum, sum Føroya Tele veitir.

Samlaði kostnaðurin í 2017 varð 329 mió. kr. í mun til 347 mió. kr. í 2016. Lækkingin stavar serliga frá lægri kostnaði til vørunýtslu og lægri lønarkostnaði. Harumframt at ávísir rakstrarkostnaðir, ið avsett varð fyri í roknskapinum fyri 2016 gjørdust lægri enn væntað.

Avskrivingarnar vóru 67 mió. kr., sum er á støði við 2016.

Ársúrslitið eftir skatt hjá Føroya Tele gjørdist eitt avlop á 51 mió. kr. í 2017 samanborið við 44 mió. kr. í 2016.

ÍLØGUR
Samtakið gjørdi í 2017 samanlagt íløgur fyri 30 mió. kr. í materiella støðisogn umframt 5 mió. kr. í immateriella støðisogn. Í 2016 vóru samlaðu íløgurnar 76 mió. kr.

FÍGGJARVIÐURSKIFTI
Fíggjarstøðan javnvigaði við 754 mió. kr. 31. desember 2017, við ársenda 2016 var javnvágin 780 mió. kr. Eginognin var tilsamans 489 mió. kr. við ársenda 2017, samanborið við 459 mió. kr. árið fyri.

Støðisognin í alt varð 540 mió. kr. við ársenda 2017, sammett við 577 mió. kr. við ársenda 2016. Av hesum vóru 504 mió. kr. materiel støðisogn og 213 mió. kr. ogn í umferð.

Skuldin hjá Føroya Tele var við ársenda 2017 samanlagt 210 mió. kr. í mun til 270 mió. kr. við ársenda 2016. Av samlaðu skuldini vóru 70 mió. kr. langfreistað skuld.

ÚRSLIT FYRI 2017
Føroya Tele samtakið hevur seinnu árini lækkað prísin á flestu produktum og tænastum. Tí varð væntað, at inntøkurnar og úrslitið í 2017 fór at gerast lakari enn í 2016.

Sølan hevur gingist betur enn væntað og íverksettar rationaliseringar hava í ávísan mun tálmað ávirkanina, sum lækkandi prísirnir hava havt á úrslitið. Úrslitið í 2017 gjørdist sostatt eisini hægri enn í 2016.

VINNINGSBÝTI
Nevndin mælir til, at tað verður útgoldið eitt vinningsbýti áljóðandi 20 mió. kr. fyri fíggjarárið 2017.

EIGARAVIÐURSKIFTI
Føroya Landsstýri eigur allan partapeniningin.

ÚTLIT FYRI 2018
Føroya Tele roknar við, at inntøkur og úrslit gerast lakari í 2018 sæð í mun til 2017. Hetta er serliga orsakað av príslækkingunum, ið vórðu gjørdar í 2017 og árini frammanundan. Fyri at tryggja, at Føroya Tele framhaldandi kann veita betri produktir, tænastur og prísir, verður áhaldandi arbeitt við at skapa ein skynsamari og effektivari rakstur, ið loyvir hesum.

MERKISVERDIR TILBURÐIR EFTIR ÁRSENDA
Ongir merkisverdir tilburðir hava verið eftir ársenda í 2017.

# ÁTEKNING LEIÐSLURNAR

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið ársfrásøgnina fyri 2017 fyri P/F Telefonverkið.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við galdandi føroyskar roknskaparreglur.

Harumframt meta vit, at leiðslu-frágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Vit meta, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2017 umframt av peninga-streymi og úrslitinum av virksemi felagsins og hjá konsernini fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2017.

Ársfrásøgnin verður løgd fram til góðkenning ársaðalfundsins.

Hoyvík, hin 18. apríl 2018

STJÓRN

Jan Ziskasen, samtaksstjóri

NEVND

Ómar Svavarsson, formaður

Glória Kalsø, næstformaður

Annbritt Tummasardóttir Nielsen, nevndarlimur

Johnni Poulsen, nevndarlimur

Poul Poulsen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

Ólavur Símonsen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

Osvald Joensen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

# VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

Til kapitaleigararnar í P/F Telefonverkið

## Átekning á konsernroknskapin og ársroknskapin

Vit hava grannskoðað konsernroknskapin og ársroknskapin hjá P/F Telefonverkið fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2017. Konsernroknskapurin og ársroknskapurin fevna um rakstrarroknskap, fíggjarstøðu, peningastreymsyvirlit og notur fyri bæði konsern og móðurfelag, herundir um nýttan roknskaparhátt. Konsernroknskapurin og ársroknskapurin eru gjørdir eftir ársroknskaparlógini.

## Ábyrgd leiðslunnar av konsernroknskapinum og ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein konsernroknskap og ein ársroknskap, ið geva eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at konsernroknskapurin og ársroknskapurin kunnu gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um konsernroknskapin og ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í konsernroknskapinum og ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í konsernroknskapinum og ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í konsernroknskapinum og ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein konsernroknskap og ein ársroknskap, sum geva eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu konsernroknskapurin og ársroknskapurin sum heild eru gjørdir.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni 31. desember 2017 hjá konserninum og móðurfelagnum og av úrslitinum av virkseminum og peningastreyminum hjá konserninum og móðurfelagnum í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2017 samsvarandi ársroknskaparlógini.

Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava, sum ásett í ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið konsernroknskapurin og ársroknskapurin vórðu grannskoðaðir. Útfrá omanfyristandandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við konsernroknskapin og ársroknskapin.

Tórshavn, 18. apríl 2018

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
statsaut. Revisor

# RAKSTRARROKNSKAPUR

## 1. Januar til 31. desember 2017

| Nota | | KONSERN 2017 (t.kr.) | KONSERN 2016 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2017 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2016 (t.kr.) |
|---|---|---|---|---|---|
| | Nettosøla | 463.499 | 475.360 | 46.470 | 54.253 |
| 1 | **Inntøkur íalt** | **463.499** | **475.360** | **46.470** | **54.253** |
| | Útreiðslur til rávørur og hjálpitilfar | -126.493 | -136.413 | -967 | -2.333 |
| | Annar rakstrarkostnaður | -73.821 | -78.626 | -11.933 | -6.865 |
| | Gjald fyri rakstur av Fjarskiftiseftirlitinum | -3.173 | -2.645 | - | - |
| | **Bruttoúrslit** | **260.012** | **257.676** | **33.570** | **45.054** |
| 2 | Starvsfólkakostnaður | -125.495 | -129.300 | -22.186 | -24.674 |
| | **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **134.517** | **128.376** | **11.384** | **20.381** |
| 3 | Avskrivingar av støðisogn | -66.514 | -67.684 | -8.033 | -9.847 |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **68.002** | **60.692** | **3.351** | **10.533** |
| 4 | Inntøkur av kapitalpørtum í atknýttum virkjum | - | - | 49.252 | 35.748 |
| | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum virki | 438 | - | 438 | - |
| 5 | Rentuinntøkur og tílíkar inntøkur | 286 | 872 | 1.432 | 732 |
| | Rentuútreiðslur og tílíkar útreiðslur | -4.644 | -4.063 | -3.258 | -1.167 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **64.082** | **57.501** | **51.216** | **45.846** |
| 6 | Skattur | -11.205 | -12.317 | -284 | -1.818 |
| | **Úrslit íroknað minnilutaeigarar** | **52.877** | **45.184** | **50.932** | **44.029** |
| | Partur hjá minnilutaeigarum av ársúrsliti | 1.945 | 1.156 | - | - |
| | **Ársúrslit** | **50.932** | **44.029** | **50.932** | **44.029** |

| | KONSERN | MÓÐURFELAG |
|---|---|---|
| Býti av ársúrsliti | | |
| Flutt frá undanfarna ári | 375.458 | 373.718 |
| Ársúrslit | 50.932 | 50.932 |
| Regulering av avleiddum fíggjartólum | - | -207 |
| Innfríðan av avleiddum fíggjartólum | -1.947 | - |
| **Til taks** | **424.443** | **424.443** |
| Ið verður skotið upp at býta soleiðis: | | |
| Vinningsbýti | 20.000 | 20.000 |
| At flyta til næsta ár | 404.443 | 404.443 |
| **Býtt íalt** | **424.443** | **424.443** |

# FÍGGJARSTØÐA

31. desember

| Nota | | KONSERN 2017 (t.kr.) | KONSERN 2016 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2017 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2016 (t.kr.) |
|---|---|---|---|---|---|
| | **AKTIV** | | | | |
| | Goodwill | 12.189 | 14.221 | 0 | 0 |
| | Nýtslurættindi | 10.321 | 9.939 | 396 | 1.229 |
| 8 | **Immateriell støðisogn** | **22.510** | **24.160** | **396** | **1.229** |
| | Grundøki og bygningar | 171.388 | 180.286 | 130.086 | 134.125 |
| | Undirstøðukervi | 280.089 | 288.980 | 1.331 | 2.143 |
| | Innbúgv og onnur rakstrartól | 48.988 | 47.594 | 14.200 | 13.381 |
| | Støðisogn í gerð | 3.064 | 16.272 | 599 | 710 |
| 9 | **Materiell støðisogn íalt** | **503.529** | **533.132** | **146.215** | **150.359** |
| | Kapitalpartar í atknýttum virkjum | -0 | -0 | 230.752 | 208.169 |
| | Kapitalpartar í associeraðum virkjum | 872 | 4.874 | 872 | 4.874 |
| | Áogn hjá atknýttum virkjum | - | - | 108.502 | |
| | Onnur áogn | 13.117 | 14.499 | - | - |
| | Onnur virðisbrøv | 22 | 199 | 22 | 199 |
| 10 | **Fíggjarlig støðisogn íalt** | **14.011** | **19.572** | **340.148** | **213.242** |
| | **STØÐISOGN ÍALT** | **540.050** | **576.864** | **486.759** | **364.830** |
| | Liðugtvøra og handilsvøra | 15.697 | 14.718 | 112 | 88 |
| | **Vørugoymslur íalt** | **15.697** | **14.718** | **112** | **88** |
| | Áogn av sølu | 83.659 | 90.480 | 335 | 244 |
| 11 | Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning | 779 | 729 | - | - |
| | Áogn hjá atknýttum virkjum | - | - | 25.180 | 120.536 |
| | Vinningsbýti tilgóðar | - | - | 26.462 | 24.000 |
| | Onnur áogn | 1.515 | 1.515 | 305 | 74 |
| | Tíðaravmarkingar | 5.989 | 6.258 | 1.129 | 612 |
| 12 | **Áogn íalt** | **91.942** | **98.982** | **53.411** | **145.466** |
| | **Tøkur peningur** | **105.817** | **89.755** | **4.394** | **4.711** |
| | **OGN Í UMFERÐ ÍALT** | **213.456** | **203.455** | **57.916** | **150.265** |
| | **AKTIV ÍALT** | **753.506** | **780.319** | **544.676** | **515.095** |

# FÍGGJARSTØÐA

31. desember

| Nota | | KONSERN 2017 (t.kr.) | KONSERN 2016 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2017 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2016 (t.kr.) |
|---|---|---|---|---|---|
| | **PASSIV** | | | | |
| | Partapeningur | 60.000 | 60.000 | 60.000 | 60.000 |
| | Yvirkursgrunnur | 24.868 | 24.868 | 24.868 | 24.868 |
| | Grunnur fyri dagsvirði á avleiddum fíggjartólum | - | -1.740 | - | - |
| | Fluttur vinningur | 404.443 | 375.458 | 404.443 | 373.718 |
| 13 | **Eginpeningur íalt** | **489.311** | **458.586** | **489.311** | **458.586** |
| 14 | **Partur hjá minnilutaeigarum av eginogn** | **11.019** | **9.074** | **-** | **-** |
| 15 | Eftirløn fráfarin starvsfólk | 2.653 | 4.200 | 2.653 | 4.200 |
| 16 | Útsettur skattur | 37.679 | 36.336 | 3.427 | 3.355 |
| | Aðrar avsetingar | 3.304 | 2.430 | - | - |
| | **Avsetingar íalt** | **43.636** | **42.966** | **6.080** | **7.554** |
| 17 | Lánistovnar | - | 50.150 | - | 13.750 |
| 18 | Tíðaravmarkingar | 70.407 | 82.338 | - | - |
| | **Langfreistað skuld íalt** | **70.407** | **132.488** | **-** | **13.750** |
| 17 | Lániskuld, sum fellur til gjaldingar í komandi ári | - | 9.790 | - | 2.500 |
| 18 | Tíðaravmarkingar stuttfreistað | 17.608 | 16.122 | - | - |
| | Lánistovnar | 12.749 | - | 12.749 | - |
| | Vøru- og tænastuskuld | 31.471 | 32.891 | 3.412 | 987 |
| 6 | Partafelagsskattur | 9.294 | 8.389 | 8.071 | 7.430 |
| | Skuld til atknýtt virki | - | - | 325 | -0 |
| | Uppskot til vinningsbýti | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 |
| | Onnur skuld | 48.011 | 47.891 | 4.726 | 4.286 |
| | Avleidd fíggjartól | - | 2.122 | - | - |
| | **Stuttfreistað skuld íalt** | **139.133** | **137.205** | **49.283** | **35.204** |
| | **SKULD ÍALT** | **209.540** | **269.693** | **49.283** | **48.954** |
| | **PASSIV ÍALT** | **753.506** | **780.319** | **544.676** | **515.095** |

19 Nærstandandi partar

20 Veðsetingar, møguligar skyldur v.m.

# PENINGASTREYMSYVIRLIT

| | KONSERN 2017 (t.kr.) | KONSERN 2016 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2017 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2016 (t.kr.) |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur íalt | 463.499 | 475.360 | 46.470 | 54.253 |
| Kostnaður íalt | -340.187 | -346.984 | -35.370 | -35.690 |
| **Peningastreymur frá inntøkum og kostnaði** | **123.312** | **128.376** | **11.100** | **18.563** |
| Broyting í vørugoymslum | -980 | 2.546 | -24 | 427 |
| Broyting í áogn og goldið frammanundan frá kundum | 7.040 | -9 | -13.985 | 4.034 |
| Broyting vøru- og tænastuskuld, aðrari skuld og eftirl.skyldum | -10.169 | -17.989 | 2.357 | -6.705 |
| **Peningastreymur frá rakstri** | **119.203** | **112.924** | **-552** | **16.319** |
| Íløgur í immateriella støðisogn | -5.428 | -8.637 | - | -366 |
| Íløgur í materiella støðisogn, netto | -29.834 | -67.571 | -3.056 | -9.523 |
| Íløgur í fíggjarliga støðisogn, netto | 5.999 | -14.472 | 4.617 | 27 |
| **Peningastreymur frá íløgum** | **-29.263** | **-90.680** | **1.561** | **-9.862** |
| **Fríur peningastreymur** | **89.940** | **22.244** | **1.010** | **6.457** |
| Rentukostnaður, netto | -4.358 | -3.191 | -1.826 | -436 |
| Fremmandafígging | -49.521 | -9.844 | -3.501 | -2.500 |
| Móttikið vinningsbýti frá dóttirfeløgum | - | - | 24.000 | 19.500 |
| Goldið vinningsbýti | -20.000 | -25.000 | -20.000 | -25.000 |
| **Peningastreymur frá fígging** | **-73.879** | **-38.036** | **-1.327** | **-8.436** |
| **Ársins peningastreymur frá rakstri, íløgum og fígging** | **16.061** | **-15.792** | **-317** | **-1.979** |
| Tøkur peningur 1. januar | 89.756 | 105.548 | 4.711 | 6.690 |
| **Tøkur peningur 31. desember** | **105.817** | **89.756** | **4.394** | **4.711** |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| Nota | | KONSERN | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 2017 | 2016 | 2017 | 2016 |
| | | (t.kr.) | (t.kr.) | (t.kr.) | (t.kr.) |
| 1 | **Inntøkur fyri samtakið - býtt geografiskt** | | | | |
| | Føroyar | 422.326 | 432.170 | - | - |
| | Útland | 41.172 | 43.190 | - | - |
| | ÍALT | 463.499 | 475.360 | - | - |
| 2 | **STARVSFÓLKAKOSTNAÐUR** | | | | |
| | Lønir | -107.287 | -110.716 | -18.581 | -20.616 |
| | Eftirlønargjøld | -12.462 | -12.562 | -2.133 | -2.236 |
| | Annar starvsfólkakostnaður | -5.746 | -6.022 | -1.472 | -1.822 |
| | **Starvsfólkakostnaður íalt** | **-125.495** | **-129.300** | **-22.186** | **-24.674** |
| | **Løn og samsýning til stjóra og nevnd íalt** | **-3.250** | **-2.749** | **-3.154** | **-2.653** |
| | Løn til íløgur | 1.564 | 3.956 | - | - |
| | Fulltíðarsett størv | 249 | 246 | 39 | 36 |
| 3 | **Avskrivingar av støðisogn** | | | | |
| | Immateriell støðisogn | -7.077 | -9.444 | -833 | -1.096 |
| | Grundøki og bygningar | -6.658 | -6.454 | -4.261 | -4.304 |
| | Undirstøðukervi | -40.769 | -39.073 | -813 | -827 |
| | Innbúgv og onnur rakstrartól | -15.258 | -13.441 | -4.366 | -4.320 |
| | Vinningur við frágongd av støðisogn | 3.247 | 1.013 | 2.240 | 727 |
| | Tap við frágongd av støðisogn | - | -285 | - | -28 |
| | **Avskrivingar íalt** | **-66.514** | **-67.684** | **-8.033** | **-9.847** |
| 4 | **Inntøkur av kapitalpørtum í atknýttum virkjum** | | | | |
| | Úrslit í atknýttum virkjum | - | - | 51.284 | 37.780 |
| | Avskriving goodwill | - | - | -2.032 | -2.032 |
| | **Inntøkur av kapitalpørtum í atknýttum virkjum íalt** | - | - | **49.252** | **35.748** |
| 5 | **RENTUINNTØKUR OG TÍLÍKAR INNTØKUR** | | | | |
| | Renta av innistandandi og skuldarum | 286 | 872 | - | 24 |
| | Renta av áogn í atknýttum virkjum | - | - | 1.432 | 708 |
| | **Rentuinntøkur og tílíkar inntøkur íalt** | **286** | **872** | **1.432** | **732** |
| 6 | **SKATTUR** | | | | |
| | Skattur av ársins skattskyldugu inntøku | -10.243 | -11.057 | -211 | -3.655 |
| | Javning av útsettum skatti | -962 | -1.260 | -73 | 1.838 |
| | **Skattur íalt** | **-11.205** | **-12.317** | **-284** | **-1.818** |
| 7 | **GJALD TIL ÁRSAÐALFUNDARVALDAN GRANNSKOÐARA** | | | | |
| | Lógarkravd grannskoðan | 470 | 640 | 155 | 164 |
| | Aðrar váttanir við trygd | 74 | 60 | - | 18 |
| | Skattaráðgeving | 31 | 21 | - | 13 |
| | Aðrar tænastur | 930 | 236 | 200 | 44 |
| | **Samlað gjald til Spekt** | **1.505** | **957** | **355** | **238** |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

Nota, t.kr.

**8 IMMATERIELL STØÐISOGN**

| KONSERN | Goodwill | Útvegaði nýtsluræ ttindi | Íalt |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2017 | 32.472 | 104.079 | 136.550 |
| Frágongd í árinum | -1.300 | -272 | -1.572 |
| Tilgongd í árinum | - | 5.428 | 5.428 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2017** | **31.172** | **109.234** | **140.406** |
| | | | |
| Avskrivingar 1. januar 2017 | -18.251 | -94.139 | -112.390 |
| Áður avskrivað upp á frágongd | 1.300 | 272 | 1.572 |
| Avskrivingar í árinum | -2.032 | -5.046 | -7.078 |
| **Avskrivingar 31. desember 2017** | **-18.982** | **-98.913** | **-117.896** |
| | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2017** | **12.189** | **10.321** | **22.510** |
| | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2016** | **14.221** | **9.939** | **24.160** |
| | | | |
| Verður avskrivað yvir | 2-10 ár | 3-5 ár | |

| MÓÐURFELAG | | | |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2017 | 1.800 | 53.394 | 55.194 |
| Frágongd í árinum | - | - | - |
| Tilgongd í árinum | - | - | - |
| **Útveganarvirði 31. desember 2017** | **1.800** | **53.394** | **55.194** |
| | | | |
| Avskrivingar 1. januar 2017 | -1.800 | -52.165 | -53.965 |
| Áður avskrivað upp á frágongd | - | - | - |
| Avskrivingar í árinum | - | -833 | -833 |
| **Avskrivingar 31. desember 2017** | **-1.800** | **-52.998** | **-54.798** |
| | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2017** | - | **396** | **396** |
| | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2016** | - | **1.229** | **1.229** |
| | | | |
| Verður avskrivað yvir | 2-10 ár | 3-5 ár | |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

Nota, t.kr.

**9 MATERIELL STØÐISOGN**

| **KONSERN** | Grundøki og bygningar | Undirstøðukervi | Innbúgv og onnur rakstrartól | Støðisogn í gerð |
|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2017 | 264.380 | 713.859 | 205.599 | 16.272 |
| Frágongd í árinum | -13.256 | -14.463 | -4.461 | -16.272 |
| Tilgongd í árinum | 3.710 | 31.877 | 16.894 | 3.064 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2017** | **254.833** | **731.273** | **218.033** | **3.064** |
| | | | | |
| Avskrivingar 1. januar 2017 | -84.093 | -424.878 | -158.006 | - |
| Áður avskrivað upp á frágongd | 7.306 | 14.463 | 4.219 | - |
| Avskrivingar í árinum | -6.658 | -40.769 | -15.258 | - |
| **Avskrivingar 31. desember 2017** | **-83.446** | **-451.184** | **-169.044** | **-** |
| | | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2017** | **171.388** | **280.089** | **48.988** | **3.064** |
| | | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2016** | **180.286** | **288.980** | **47.594** | **16.272** |
| | | | | |
| Verður avskrivað yvir | 30-50 ár | 10-25 ár | 2-10 ár | |

Grundøki við einum samlaðum bókaðum virði upp á 16,7 mió. kr. verða ikki avskrivað.

| **MÓÐURFELAG** | Grundøki og bygningar | Undirstøðukervi | Innbúgv og onnur rakstrartól | Støðisogn í gerð |
|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2017 | 186.009 | 30.605 | 68.352 | 710 |
| Frágongd í árinum | -3.731 | - | -2.462 | -710 |
| Tilgongd í árinum | 1.671 | - | 5.426 | 599 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2017** | **183.949** | **30.605** | **71.316** | **599** |
| | | | | |
| Avskrivingar 1. januar 2017 | -51.884 | -28.462 | -54.971 | - |
| Áður avskrivað upp á frágongd | 2.281 | - | 2.221 | - |
| Avskrivingar í árinum | -4.261 | -813 | -4.366 | - |
| **Avskrivingar 31. desember 2017** | **-53.864** | **-29.274** | **-57.116** | **-** |
| | | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2017** | **130.086** | **1.331** | **14.200** | **599** |
| | | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2016** | **134.125** | **2.143** | **13.381** | **710** |
| | | | | |
| Verður avskrivað yvir | 30-50 ár | 10-25 ár | 2-10 ár | |

Grundøki við einum samlaðum bókaðum virði upp á 14,3 mió. kr. verða ikki avskrivað.

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

Nota, t.kr.

**10 FÍGGJARLIG STØÐISOGN**

| **KONSERN** | Onnur ogn | Kapitalpartar í atknýttum virkjum | Kapitalpartar í associeraðum virkjum | Onnur virðisbrøv og kapitalpartar |
|---|---|---|---|---|
| Útveganarpeningur 1. januar 2017 | 14.499 | - | 1.700 | 199 |
| Javning av primo | - | - | - | -139 |
| Tilgongd í árinum | - | - | - | - |
| Frágongd í árinum | -1.382 | - | -650 | -38 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2017** | **13.117** | **-** | **1.050** | **22** |
| | | | | |
| Upp- og niðurskrivingar 1. januar 2017 | - | - | 3.174 | - |
| Javning av primo | - | - | -206 | - |
| Áður uppskrivað upp á frágongd | - | - | -3.174 | - |
| Úrslit í kapitalpørtum | - | - | 28 | - |
| **Upp- og niðurskrivingar 31. desember 2017** | **-** | **-** | **-178** | **-** |
| | | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2017** | **13.117** | **-** | **872** | **22** |
| | | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2016** | **14.499** | **-** | **4.874** | **199** |
| | | | | |
| **MÓÐURFELAG** | | | | |
| Útveganarpeningur 1. januar 2017 | - | 284.657 | 3.000 | 199 |
| Javning av primo | - | - | - | -139 |
| Tilgongd í árinum | - | - | - | - |
| Frágongd í árinum | - | - | -1.950 | -38 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2017** | **-** | **284.657** | **1.050** | **22** |
| | | | | |
| Uppskrivingar 1. januar 2017 | - | -58.238 | 3.174 | - |
| Javning av primo | - | 16 | -206 | - |
| Áður uppskrivað upp á frágongd | - | - | -3.174 | - |
| Javning avleidd fíggjartól í atknýttum virkjum | - | -207 | - | - |
| Úrslit í kapitalpørtum | - | 51.267 | 28 | - |
| Vinningsbýti | - | -26.462 | - | - |
| **Uppskrivingar 31. desember 2017** | **-** | **-33.624** | **-178** | **-** |
| | | | | |
| Niður- og avskrivingar 1. januar 2017 | - | -18.251 | -1.300 | - |
| Avskriving goodwill | - | -2.032 | - | - |
| Áður avskrivað upp á frágongd | - | - | 1.300 | - |
| **Niður- og avskrivingar 31. desember 2017** | **-** | **-20.282** | **-** | **-** |
| | | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2017** | **-** | **230.751** | **872** | **22** |
| | | | | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2016** | **-** | **208.169** | **4.874** | **199** |

Roknskaparliga restvirði av goodwill knýtt at kapitalpørtum var 12,2 mió. kr. pr. 31.12.2017 (2016: 14,2 mió.)
Kapitalpartarnir í atknýttum og øðrum virkjum sundurgreina seg soleiðis:

| Navn | Heimstaður | Eginogn mió. kr. | Úrslit mió. kr. | Ognarpartur |
|---|---|---|---|---|
| P/F FT Net | Tórshavn | 97,6 | 9,3 | 100% |
| P/F FT Samskifti | Tórshavn | 71,3 | 19,3 | 100% |
| P/F Televarpið | Tórshavn | 3,9 | 6,0 | 100% |
| P/F Shefa | Tórshavn | 19,4 | 9,8 | 100% |
| P/F Formula | Tórshavn | 33,8 | 8,8 | 78% |
| Sp/f Føroyska Nummar Felagið | Tórshavn | 1,2 | -0,1 | 70% *) |
| Samtakið Klintra/Føroya Tele Í/F | Tórshavn | 0,1 | 0,1 | 50% |

*) Ársroknskapurin fyri 2017 er ikki tøkur enn. Tølini eru sambært ársroknskapinum 2016.
P/F Telefonverkið ræður yvir 50% av atkvøðunum í felagnum

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| Nota | | KONSERN 2017 (t.kr.) | KONSERN 2016 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2017 (t.kr.) | MÓÐURFELAG 2016 (t.kr.) |
|---|---|---|---|---|---|
| 11 | **Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning** | | | | |
| | Arbeiði í gerð, søluprísur | 1.573 | 3.516 | - | - |
| | Arbeiði í gerð, ávegisfakturerað | -6.472 | -6.980 | - | - |
| | **Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning íalt** | **-4.899** | **-3.464** | - | - |
| | | | | | |
| | Er innroknað í fíggjarstøðuna: | | | | |
| | Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning undir áogn | 779 | 729 | - | - |
| | Tíðaravmarkingar stuttfreistað undir stuttfreistað skuld | -5.678 | -4.193 | - | - |
| | **Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning íalt** | **-4.899** | **-3.464** | - | - |

**12 Áogn**

Øll áogn í móðurfelagnum og konsernini fellur til gjaldingar innan 1 ár.

| Nota | | KONSERN 2017 | KONSERN 2016 | MÓÐURFELAG 2017 | MÓÐURFELAG 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| 13 | **EGINPENINGUR** | | | | |
| | Partapeningur | 60.000 | 60.000 | 60.000 | 60.000 |
| | Yvirkursgrunnur | 24.868 | 24.868 | 24.868 | 24.868 |
| | | | | | |
| | **Grunnur fyri dagsvirði á avleiddum fíggjartólum** | | | | |
| | Tiltakspeningur 1. januar | -1.740 | - | - | - |
| | Lagt í grunn/tikið úr grunni í árinum | -253 | -2.122 | - | - |
| | Javning avleidd fíggjartól, útsettur skattur | 46 | 382 | - | - |
| | Innfríðan av avleiddum fíggjartólum | 1.947 | - | - | - |
| | **Tiltakspeningur 31. desember** | - | **-1.740** | - | - |
| | | | | | |
| | **Fluttur vinningur** | | | | |
| | Fluttur vinningur 1. januar | 375.458 | 351.430 | 373.718 | 351.430 |
| | Flutt frá ársúrslitinum | 52.877 | 45.184 | 50.932 | 44.029 |
| | Regulering avleidd fíggjartól | -1.947 | - | -207 | -1.740 |
| | Partur hjá minnilutaeigarum av ársúrslitinum | -1.945 | -1.156 | - | - |
| | Vinningsbýti | -20.000 | -20.000 | -20.000 | -20.000 |
| | **Fluttur vinningur 31. desember** | **404.443** | **375.458** | **404.443** | **373.718** |
| | **Eginpeningur íalt** | **489.311** | **458.586** | **489.311** | **458.586** |

Partapeningurin fevnir um eitt partabræv áljóðandi 60 mió. kr.

| Nota | | KONSERN 2017 | KONSERN 2016 | MÓÐURFELAG 2017 | MÓÐURFELAG 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| 14 | **PARTUR HJÁ MINNILUTAEIGARUM AV EGINOGN** | | | | |
| | Partur hjá minnilutaeigarum av eginogn primo | 9.074 | 7.918 | - | - |
| | Partur hjá minnilutaeigarum av ársúrsliti | 1.945 | 1.156 | - | - |
| | **Partur hjá minnilutaeigarum av eginogn ultimo** | **11.019** | **9.074** | - | - |
| | | | | | |
| 15 | **EFTIRLØN TIL FRÁFARIN STARVSFÓLK** | | | | |
| | Avsett til eftirløn 1. januar | 4.200 | 4.395 | 4.200 | 4.395 |
| | Útgoldið í eftirlønum | -816 | -945 | -816 | -945 |
| | Regulering í árinum | -730 | 750 | -730 | 750 |
| | **Avsett til eftirløn 31. desember** | **2.653** | **4.200** | **2.653** | **4.200** |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| Nota | | KONSERN | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 2017 | 2016 | 2017 | 2016 |
| | | (t.kr.) | (t.kr.) | (t.kr.) | (t.kr.) |
| 16 | **ÚTSETTUR SKATTUR** | | | | |
| | Útsettur skattur 1. januar | 36.336 | 35.457 | 3.355 | 5.192 |
| | Útsettur skattur, avleidd fíggjartól | 382 | -382 | - | - |
| | Javning av útsettum skatti | 962 | 1.260 | 73 | -1.838 |
| | **Útsettur skattur 31. desembur** | **37.679** | **36.335** | **3.427** | **3.355** |
| 17 | **LÁNISTOVNAR** | | | | |
| | Fellur til gjaldingar innan 1 ár | - | 9.790 | - | 2.500 |
| | Fellur til gjaldingar millum 1 og 5 ár | - | 39.160 | - | 10.000 |
| | Fellur til gjaldingar eftir 5 ár | - | 10.990 | - | 3.750 |
| | **Lánistovnar íalt** | - | **59.940** | - | **16.250** |
| 18 | **TÍÐARAVMARKINGAR** | | | | |
| | Fellur til gjaldingar innan 1 ár | 17.608 | 16.122 | - | - |
| | Fellur til gjaldingar millum 1 og 5 ár | 47.719 | 47.719 | - | - |
| | Fellur til gjaldingar eftir 5 ár | 22.689 | 34.618 | - | - |
| | **Tíðaravmarkingar íalt** | **88.016** | **98.459** | - | - |

Tíðaravmarkingar umfatað forútgjald frá kundum.

**19 NÆRSTANDANDI PARTAR**

Nærstandandi partar felagsins eru: Føroya Landsstýri, P/F FT Samskifti, P/F FT Net, P/F Shefa, P/F Televarpið, P/F Formula, P/F Formula Solutions, Sp/f Føroyska Nummar Felagið og Samtakið Klintra/Føroya Tele Í/F

**Samhandil felagsins við nærstandandi partar**

Felagið hevur í árinum havt samhandil við dótturfeløgini. Allur handil er farin fram undir somu treytum sum allir aðrir handlar hjá felagnum.

**Avgerðandi ávirkan**

Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin í felagnum

**20 VEÐSETINGAR OG AÐRAR MØGULIGAR SKYLDUR**

VEÐSETINGAR

KONSERN: Sum trygd fyri millumverandi við peningastovn eru tinglýst veð- og skaðaloysisbrøv uppá íalt 257 mió. kr. í føstum ognum, ið hava eitt bókað virði upp á 132 mió. kr.

Í leysafæ felagsins er sum trygd fyri kassakredit frá peningastovni tinglýst veð upp á 3 mió. kr.
Veittar eru ábyrgdir fyri íalt 2,9 mió. kr.

| **LEIGU- OG LANGLEIGUSÁTTMÁLAR** | |
|---|---|
| Innan 1 ár | 4.527 |
| Millum 1 og 5 ár | 8.786 |
| Aftaná 5 ár | 10.000 |
| **Íalt** | **23.313** |

MÓÐURFELAG: Sum trygd fyri millumverandi við peningastovn eru tinglýst veð- og skaðaloysisbrøv uppá íalt 255 mió. kr. í føstum ognum, ið hava eitt bókað virði uppá 130 mió. kr. Veittar eru ábyrgdir fyri íalt 0,1 mió. Kr.

SHEFA

Móðurfelagið borgar fyri, at Shefa yvirheldur sínar treytir í kontrakt við viðskiftafólk í útlandinum

P/F Telefonverkið er samskattað við tess 100% áttu dótturfeløg og heftir solidariskt mótvegis TAKS fyri øllum samskattingarkrøvum mótvegis hesum feløgum

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Ársfrásøgnin fyri Føroya Tele (P/F Telefonverkið) fyri 2017 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í bólki C stór.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár, tó undantikið av, at avskrivingartíðarskeiðið á innanoyggja fipurkaðalum og tilhoyrandi arbeiði er broytt frá 15 árum til 25 ár. Tann samlaða ávirkanin frá broytta avskrivingartíðarskeiðnum av fipurkaðalum er, at avskrivingarnar lækka til 66,5 mió. kr. í 2017 í mun til 67,7 mió. kr. í 2016. Hetta førir við sær at úrslitið, fíggjarstøðan og eginognin fyri 2017 eru hækkað við 2,5 mió. kr. orsaka av broyttu avskrivingunum.

Broytingin hevur ikki ávirkan á samanberingartølini.

## Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar. Útreiðslur nýttar til at røkka ársins inntøku verða tiknar við í rakstrarroknskapin.

## Konsernfrásøgn

Konsernfrásøgnin fevnir um móðurfelagið Føroya Tele umframt dótturfeløg, har Føroya Tele beinleiðis ella óbeinleiðis eigur meira enn 50% av atkvøðurættinum, ella á annan hátt hevur avgerandi ávirkan.

Í sambandi við konsolideringina verða innanhýsis inntøkur og útreiðslur, innanhýsis millumverandi eins og innanhýsis vinningur og tap av transaktiónum millum tey konsolideraðu feløgini útjavnað.

Kapitalpartar í dótturfeløgum verða útjavnaðir við lutfalsliga partinum av handilsvirðinum av nettoognum og skyldum hjá dótturfeløgunum útveganardagin.

Keypt ella nýstovnað feløg verða upptikin í konsernfrásøgnini frá útveganardegnum. Seld ella avtikin feløg verða upptikin í konsernfrásøgnina fram til sølu/avtøku. Samanberingartølini verða ikki rættað fyri keypt, seld ella avtikin feløg.

Tá ið feløg verða keypt, verður yvirtøkuhátturin nýttur. Positivir munir (goodwill) millum útvegnarvirðið og dagsvirðið á yvirtiknum ognum og skyldum verða upptiknir sum immateriell støðisogn og avskrivaðir við eins stórum upphæddum í rakstrarroknskapinum eftir eini meting av livitíðini, tó í mesta lagi 10 ár.

## Minnilutapartaeigarar

Í konsernfrásøgnini verða roknskaparupphæddir hjá dótturfeløgum upptiknar við fullari upphædd. Lutfalsligi parturin av úrslitinum og eginpeninginum hjá minnilutapartaeigarunum í dótturfeløgunum verður javnaður árliga og upptikin sum serstakur postur í rakstrinum og fíggjarstøðuni.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra
Transaktiónir í fremmandum gjaldoyra verða í fyrsta umfari umroknaðar eftir kursinum transaktiónsdagin. Gjaldoyramunir, ið íkoma millum kursin transaktiónsdagin og kursin á gjalddegnum, verða tiknir við í rakstrarroknskapinum sum ein fíggjarligur postur.

Áogn, skuld og aðrar peningaligar upphæddir í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðar til kursin við roknskaparárslok. Munurin millum kursin við roknskaparárslok og dagin, tá ið áognin ella skuldin íkom, verður tikin við í rakstrinum undir fíggjarligum inntøkum og kostnaðum.

## Rakstarroknskapurin

### Nettosøla
Inntøkur frá sølu av vørum og tænastum verða tiknar við í rakstrarroknskapin, um útflýggjan og váðaskifti er farið fram áðrenn roknskaparlok. Nettoinntøkan verður uppgjørd uttan mvg og onnur avgjøld og við frádrátti av øllum givnum avsláttrum.

Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning verða inntøkuførd, tá ið arbeiðið er liðugt.

Vísandi til §96, stk. 1 í ársroknskaparlógini er nettosølan av kappingarávum ikki býtt út á virkisøki. Landafrøðiligt uppbýti er tó gjørt.

### Útreiðslur til rávøru og hjálpitilfar
Útreiðslur til rávøru og hjálpitilfar fevna um tilfarsnýtslu til vørusølu og annan rakstur.

### Annar rakstrarkostnaður
Rakstrarkostnaður fevnir um allan annan rakstrarkostnað.

### Gjald fyri rakstur av fjarskiftiseftirlitinum
Talan er um gjald fyri rakstur av fjarskiftiseftirlitinum ásett av landsstýrinum.

### Starvsfólkakostnaður
Starvsfólkakostnaður fevnir um lønir, íroknað frítíðarløn og eftirlønir umframt aðrar kostnaðir til sosiala trygd v.m. til starvsfólk felagsins. Móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum eru drigin frá starvsfólkakostnaðinum.

### Av- og niðurskrivingar
Av- og niðurskrivingar fevna um ársins av- og niðurskrivingar uppá immateriella og materiella støðisogn.

### Úrslit av kapitalpørtum í dótturfeløgum og assosieraðum feløgum
Upphæddin inniheldur lutfalsliga partin av ársúrslitinum hjá dótturfeløgum og assosieraðum feløgum eftir útjavnan av innanhýsis vinningi/tapi og við frádrátti av avskriving av goodwill.

Lutfalsligi parturin av skatti í dótturfeløgum verður tikin við í upphæddini "Skattur" í rakstrarroknskapinum.

### Fíggjarligar inntøkur og útreiðslur
Fíggjarligar inntøkur og útreiðslur fevna um rentuinntøkur og -útreiðslur, kursvinning og -tap viðvíkjandi virðisbrøvum, skuld og transaktiónum í fremmandu gjaldoyra.

### Skattur av ársúrslitinum
Partafelagsskattur og broyting í útsettum skatti viðvíkjandi ársúrslitinum verða rakstrarførd, meðan skattur viðvíkjandi bókingum beinleiðis á eginpeningin verður bókaður beinleiðis á eginpeningin.

Avsetingin til útsettan skatt verður roknað við 18% av teimum tíðarbundnu frávikunum, sum stava frá at inntøkur og útreiðslur ikki verða tiknar við í rakstrarroknskapin og skattskyldugu inntøkuna í sama tíðarskeiði.

Móðurfelagið er samskattað við P/F FT Samskifti, P/F FT Net, P/F Televarpið og P/F Shefa. Partafelagsskatturin verður býttur millum tey samskattaðu feløgini í mun til

lutfalsligu skattskyldugu inntøkuna hjá hesum feløgum.

Fíggjarstøðan

## Immateriell støðisogn

Immateriell støðisogn verður upptikin til kostprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini, tó í mesta lagi 10 ár. Avskrivingartíðarskeiðið er longst fyri strategiskar íløgur í feløg við sterkari marknaðarstøðu.

Menningarverkætlanir verða ognarførdar, um tær eru nágreiniliga lýstar, um felagið ætlar og er ført fyri at gagnnýta úrslitini, um kostprísurin kann gerast upp álítandi og um nóg góð trygd er fyri, at inntøkur í framtíðini kunnu forrenta menningar-kostnaðin umframt framleiðslu-, sølu og umsitingarligu kostnaðirnar. Aðrir menningarkostnaðir verða útreiðsluførdir í rakstrarroknskapinum so hvørt sum kostnaðirnir verða staðfestir. Ásettu avskrivingartíðarskeiðini eru:

| | |
|---|---|
| Goodwill | 2-10 ár |
| Útvegaðir einkarrættir | 3-5 ár |

Immateriell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um tørvur er á niðurskriving.

## Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður upptikin til kostprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði. Grundøki verða ikki avskrivað.

Kostprísur er útveganarprísur, umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Ásettu avskrivingartíðarskeiðini og restvirðini eru:

| | Áramál | Restvirði |
|---|---|---|
| Grundøki | - | 100% |
| Bygningar | 30-50 ár | 0% |
| Mastrar | 30 ár | 0% |
| Undirstøðukervi | 10-25 ár | 0% |
| Innbúgv og onnur rakstrartól | 2-10 ár | 0% |

Materiell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um tørvur er á niðurskriving.

Vinningur ella tap við frágongd av materiellari støðisogn verður uppgjørt sum munurin millum sølupris við frádrátti av søluútreiðslum og roknskaparliga virðinum á sølutíðspunktinum. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrar-roknskapinum undir avskrivingum.

## Kapitalpartar í dótturfeløgum og assosieraðum feløgum

Kapitalpartar í dótturfeløgum og assosi-eraðum feløgum verða tiknir við í fíggjarstøðuna við lutfalsliga partinum av innara virðinum hjá feløgunum við ískoyti av restvirðinum á møguligum goodwill.

Nettouppskriving av kapitalpørtum í dótturfeløgum og assosieraðum feløgum verður flutt til eginpeningin í netto-uppskrivingargrunn eftir innaravirðis-háttinum í tann mun rokn-skaparliga virðið er hægri enn útveganar-virðið.

Tá ið feløg verða keypt, verður yvirtøku-hátturin nýttur. Positivir munir (goodwill) millum útveganarvirðið og dagsvirðið á yvirtiknum ognum og skyldum verða upptiknir saman við kapitalpørtum í dótturfeløgum og assosieraðum feløgum, og avskrivaðir við eins stórum upp-hæddum í rakstrarroknskapinum eftir eini meting av livitíðini, tó í mesta lagi 10 ár.

Dótturfeløg og assosierað feløg við negativum roknskaparligum innara virði verða upptikin til null, og ein møgulig

áogn hjá hesum feløgum verður niðurskrivað við lutfalsliga partinum av negativa innara virðinum hjá móðurfelagnum. Um negativa roknskaparliga innara virðið er hægri enn áognin, verður restupphæddin tikin við sum skyldur í tann mun, móðurfelagið hevur rættarliga ella veruliga skyldu til at taka á seg fíggjarligu skyldurnar hjá felagnum.

## Onnur virðisbrøv

Børsskrásett virðisbrøv, ið eru tikin við sum ogn í umferð, verða virðisásett til kursvirðið við roknskaparlok.

## Vørugoymslur

Vørugoymslur verða virðissettar til kostprís eftir FIFO-háttinum. Er nettosøluvirðið lægri enn kostprísurin, verður vørugoymslan niðurskrivað til lægra virðið.

Fyri handilsvørur umframt rávørur og hjálpitilfar svarar kostprísurin til útveganarprísin.

Fyri framleiddar liðugtvørur og vørur undir framleiðslu fevnir kostprísurin um kostprísin fyri rávørur, hjálpitilfar, beinleiðis løn og óbeinleiðis framleiðslukostnaðir.

## Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum.

## Tíðaravmarkingar (áogn)

Tíðaravmarkingar, ið eru innroknaðar sum ogn í umferð, fevna um goldnar kostnaðir viðvíkjandi komandi roknskaparárum, herundir forútgoldin leiga.

## Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning

Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning verða virðisásett til søluvirði av framda arbeiðinum.

Søluvirðið verður uppgjørt grundað á hvussu stórur partur av arbeiðinum er gjørdur við árslok. Tá ið søluvirðið ikki kann gerast upp álítandi, verður søluvirðið sett til staðfestar kostnaðir.

## Eginpeningur og vinningsbýti

Uppskot til vinningsbýti verður tikið við sum skuld í fíggjarstøðuni.

## Partafelagsskattur og útsettur skattur

Partafelagsskattur er tikin við í fíggjarstøðuna sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku.

Útsettur skattur verður uppgjørdur við útgangsstøði í munum millum roknskaparligu og skattligu virðini av ognum og skyldum.

Negativur útsettur skattur (skattaáogn) verður virðissettur til tað virði hesin væntandi kann minkað partafelagsskattin í framtíðini.

## Aðrar avsettar skyldur

Um felagið við roknskaparlok hevur rættarliga ella veruliga skyldu, og tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, verður skyldan avsett.

## Skuld

Við stovnan verða lán innroknað í fíggjarstøðuna við móttiknari upphædd, eftir frádrátt av stovningarútreiðslum. Síðani verða lán virðissett til amortiseraðan kostprís.

Onnur skuld verður virðissett til nettorealisatiónsvirði.

## Tíðaravmarkingar (skuld)

Tíðaravmarkingar fevna um móttiknar gjaldingar viðvíkjandi inntøkum í komandi roknskaparárum.

## Avleidd fíggjartól

Avleidd fíggjartól verða í fyrstu atløgu innroknað í fíggjarstøðuna til kostprís, og verða síðani virðisásett til dagsvirði. Positiv og negativ dagsvirði av avleiddum fíggjartólum verða tikin við undir aðra áogn ella aðra skuld.

Broyting í dagsvirðinum av avleiddum fíggjartólum, sum eru flokkað sum og lúka krøvini til váðavernd av dagsvirðinum av eini innroknaðari ogn ella skyldu, verður innroknað í rakstrarroknskapin saman við broytingum í dagsvirðinum av váðavardu ognini ella váðavardu skylduni.

Broyting í dagsvirðinum av avleiddum fíggjartólum, sum eru flokkað sum og lúka krøvini til váðavernd av væntaðum framtíðar peningastreymum, verður innroknað undir aðra áogn ella aðra skuld og undir eginognina. Standast ognir ella skyldur av hesi framtíðar transaktión, verða upphæddir, sum áður eru útsettar á eginognina, fluttar til keypsprísin á ávikavist ognini ella skylduni. Standast inntøkur ella kostnaðir av hesi framtíðar transaktión, verða upphæddir, sum eru útsettar á eginognina, fluttar til raksturin í tí tíðarskeiði sum tað tryggjaða ávirkar raksturin.

Fyri avleidd fíggjartól, ið ikki lúka treytirnar fyri at verða viðgjørd sum váðaverndartól, verður broytingin í dagsvirðinum innroknað í rakstrarroknskapin so hvørt.

## Peningastreymsyvirlit

Peningastreymsútgreiningin vísir felagsins peningastreym gjøgnum árið umframt gjaldførisstøðuna við árslok. Peningastreymurin er serliga knýttur at trimum økjum: Rakstur, íløgur og fígging.

Peningastreymsútgreiningin verður sett upp soleiðis, at peningastreymur frá rakstri verður vístur óbeinleiðis við útgangsstøði í rakstrarinntøkunum og rakstrarútreiðslunum í rakstrarroknskapinum.

Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir og stuttfreistað virðisbrøv upptikin undir ogn í umferð.

Peningastreymur frá rakstri verður uppgjørdur sum úrslit av primerum rakstri javnað fyri ikki tøkar rakstrarupphæddir við ískoyti av øking ella minking í arbeiðspeningi, fíggjarligum og óvanligum upphæddum og frádrigið goldnan partafelagsskatt.

Arbeiðspeningur fevnir um ogn í umferð, uttan tær upphæddir, sum eru í tøkum peningi, og stuttfreistaða skuld, uttan bankaskuld, veðskuld, skatt og vinningsbýti. Soleiðis eru tøkur peningur og møgulig virðisbrøv upptikin undir ogn í umferð ikki tikin við.

Peningastreymur til íløgur fevnir um keyp og sølu av støðisogn.

Keypsupphæddir verða uppgjørdar til útveganarvirði. Søluupphæddir verða uppgjørdar til søluprís við frádrátti av handilskostnaði.

Gjaldføri frá fígging fevnir um gjøld til og frá partaeigarum umframt upptøku og avdráttir av veðskuld og aðrari langfreistaðari og stuttfreistaðari skuld, sum ikki er tikin við í arbeiðspeninginum.

# NEVND & STJÓRN

Ómar Svavarsson, formaður

| | |
|---|---|
| Starv: | Stjóri í Securitas HF |
| Bústaður: | Hafnarfjörður, Ísland |
| Útbúgving: | Cand. Oecon. degree in Business Administration |
| Nevndarlimur síðan: | 2015 |
| Nevndarsessir: | P/F Telefonverkið |

Gloria Kalsø, næstformaður

| | |
|---|---|
| Starv: | Lektari á Glasi |
| Bústaður: | Tórshavn |
| Útbúgving: | M.Sc. Law, M.Sc. Management |
| Nevndarlimur síðan: | 2015 |
| Nevndarsessir: | P/F Telefonverkið<br>Føroya Realkredittstovnur |

Annbritt Tummasdóttir Nielsen

| | |
|---|---|
| Starv: | Principal, Executive Search, í Heidrick & Struggles |
| Bústaður: | Charlottenlund, Danmark |
| Útbúgving: | M.Sc. Finance and Accounting |
| Nevndarlimur síðan: | 2013 |
| Nevndarsessur: | P/F Telefonverkið |

Johnni Poulsen

| | |
|---|---|
| Starv: | Stjóri í P/F Magn |
| Bústaður: | Miðvágur |
| Útbúgving: | M.Sc. Economics and Business Administration |
| Nevndarlimur síðan: | 2016 |
| Nevndarsessur: | P/F Telefonverkið |

Ólavur Simonsen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

| | |
|---|---|
| Starv: | KT-mennari |
| Bústaður: | Tórshavn |
| Útbúgving: | M.Sc. Software Technology, B.Sc. Electrical Engineering |
| Nevndarlimur síðan: | 2015 |
| Nevndarsessur: | P/F Telefonverkið |

Poul Poulsen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

| | |
|---|---|
| Starv: | KT-mennari |
| Bústaður: | Tórshavn |
| Útbúgving: | M.Sc. Electrical Engineering |
| Nevndarlimur síðan: | 2015 |
| Nevndarsessur: | P/F Telefonverkið |

Osvald Joensen, starvsfólkavaldur nevndarlimur

| | |
|---|---|
| Starv: | Teknikari |
| Bústaður: | Tórshavn |
| Útbúgving: | Teleteknikari |
| Nevndarlimur síðan: | 2015 |
| Nevndarsessur: | P/F Telefonverkið |

Jan Ziskasen, stjóri

| | |
|---|---|
| Starv: | Stjóri í P/F Telefonverkið |
| Bústaður: | Tórshavn |
| Utbúgving: | M.Sc. in Business Administration and Information Systems |
| Nevndarsessir: | P/F FT Net |
| | P/F FT Samskifti |
| | P/F Televarpið |
| | P/F Shefa |
| | P/F Formula |
| | Sp/f Føroyska Nummarfelagið |
| | P/F Kemilux Industri |
| | KT-Felagið |
| | Íverksetarahúsið |
| | Winterhawk Consulting PLC |
| | Mist LLC |